Stjørnan-Tjaldur 47-12 (28-6)

# Stjørnan vann stórsigur

**Greipuvinnararnir frá í fjør úr Stjørnuni vunnu sunnudagin stórsigur á botnliðnum Tjaldur í KÍ-høllini**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Bára Skaale Klakstein hjá Stjørnuni var heilt stóri spælarin í Klaksvík sunnudagin, tá ið Stjørnan vann stórsigur á Tjaldur. Bára skeyt ikki færri enn 17 mál í dystinum.*
*savnsmynd*

Stjørnan vísti beinan vegin, at tær ikki fóru at taka lætt upp á uppgávuna, og tær settu ferð á frá fyrsta bríksli. Fyrstu minuttirnir vóru eitt satt ódnarveður móti Tjaldurs-málinum hjá neyðars Lydiu Isaksen og Unn Jarnskor, og at munurin var stórur á liðunum báðum sást týðuliga. Stjørnan vann nevnliga fyrsta korterið 12-2, og tá var dysturin langt síðani avgjørdur.

**Bára gjørdi eitt ordans hál**

Í einum slíkum dysti, har mótstøðan, ið Stjørnan fekk, ikki var tann størsta, var høvi hjá venjaranum hjá steypavinnarunum, Svein Rógvi Nielsen, at geva nøkrum av vanligu eykaleikarunum eitt sindur meiri spælitíð, enn tær vanliga fáa. Men onkur av »gomlu gardini« var eisini verandi á vøllinum, og ein av teimum var Bára Skaale Klakstein, ið hevði ein av sínum heilt góðu døgum. Bára skeyt sunnudagin ikki færri enn 17 mál, og tað er óivað persónligt met hjá henni, hóast hon hevur nøkur ár á baki í bestu deildini.

Annars er ikki so nógv at siga um dystin, sum Stjørnan vann 47-12, tað vil siga, at 35 mál vóru á muni. Dysturin prógvar bara enn einaferð, hvussu stórur munurin millum fremstu og aftastu liðini í Sunset-kappingini er, og spurningurin er, um ikki HSF eigur at taka hetta upp til viðgerðar, tí tað tænir ongum, at eitt lið vikuskifti eftir vikuskifti verður avhølvað.

Hinvegin eiga tær í Tjaldur rós uppiborið fyri, at tær hóast keðiligu úrslitini møta upp so trúfastar, og tað er vert at leggja til merkir, at Tjaldur hevði 11 leikarar í hópinum sunnudagin, og tað eru tað fleiri onnur lið í deildini, sum ikki megna.

**Stjørnan-Tjaldur 47-12 (28-6)**

Stjørnan: Bára Skaale Klakstein 17, Annika Ljósstein 7(4), Katarina Stjepanov 5, Alina Olaru 5, Maria við Neyst 4(1), Joan M. Djordjevic 3, Fríða Petersen 2(2), Anna Kristina Samson 2, Una Olsen 2
Tjaldur: Heidi Sevdal 4, Anna Hansen 3, Mary Ann Isaksen 2, Ellenbjørg Hammer 1, Hanna Isaksen 1, Jacoba Langgaard 1(1)
Brotskøst: Stjørnan 9(7), Tjaldur 1(1)
Útvísingar: Stjørnan 1, Tjaldur 8
Dómarar: Kári og Dánjal Hansen

# Árliga flogbóltskappingin

Flogbóltsfelagið DRÀTTUR hevur skipað fyri árligu flogbóltskappingini hjá felagnum. Spælt hevur verið ígjár leygardagin og síðsta leygardag (tvs. 19. og 26. febr.) 90 lið hava lutikið í kappingini og bleiv spælt bæði á Giljanesi og í Sørvági.

Úrslitini gjørdust hesi:

**Gentur 10:**
nr. 1 TB
nr. 2 KÌF b
nr. 3 KÌF a

**Dreingir 10:**
nr. 1 DRÁTTUR
nr. 2 Mjølnir
nr. 3 SÌ

**Gentur 12:**
nr. 1 Fleyr A
nr. 2 KÌF
nr. 3 Mjølnir

**Dreingir 12:**
nr. 1 ÌF
nr. 2 TB
nr. 3 Mjølnir

**Gentur 14:**
nr. 1: Mjølnir
nr. 2: SÌ
nr. 3 TB

**Dreingir 14:**
nr. 1: ÍF
nr. 2: SÌ
nr. 3: Fleyr

**Kvinnuunglingar:**
nr. 1: SÌ
nr. 2: DRÀTTUR
nr. 3: KÌF

**Mannsunglingar:**
nr. 1: SÌ
nr. 2: Mjølnir A
nr. 3: Mjølnir B

## Sunset-kappingin

| | **dystir** | **v** | - | **j** | - | **vunnin t** | **tapt mál** | **mál- mál** | **munur** | **stig** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 479 | 341 | 138 | 21 |
| 2 VB | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 559 | 326 | 233 | 19 |
| 3 Neistin | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 490 | 398 | 92 | 14 |
| 4 Søljan | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 456 | 384 | 72 | 14 |
| 5 VÍF | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 412 | 422 | -10 | 7 |
| 6 StÍF | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 405 | 463 | -58 | 7 |
| 7 Kyndil | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 355 | 484 | -129 | 5 |
| 8 Tjaldur | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 276 | 614 | -338 | 0 |

Atlantic Airways-kappingin

| | **dystir** | **v** | - | **j** | - | **vunnin t** | **tapt mál** | **mál- mál** | **munur** | **stig** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 7 | 6 | - | 0 | - | 1 | 499 | 446 | 53 | 20 |
| 2 Kyndil | 7 | 3 | - | 0 | - | 4 | 498 | 419 | 79 | 14 |
| 3 StÍF | 7 | 4 | - | 2 | - | 1 | 452 | 481 | -29 | 13 |
| 4 KÍF | 7 | 3 | - | 1 | - | 3 | 429 | 461 | -32 | 11 |
| 5 H71 | 7 | 2 | - | 0 | - | 5 | 488 | 499 | -11 | 9 |
| 6 Neistin | 7 | 1 | - | 1 | - | 5 | 464 | 524 | -60 | 6 |

## Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nicoleta Radu Hansen | Søljan | 172 | (22) |
| Daiva Tuomaite | VB | 171 | (55) |
| Ioana Rápa | VÍF | 139 | (30) |
| Simona Petersen | Neistin | 126 | (29) |
| Lina Andriulyte | Søljan | 102 | (13) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 98 | (7) |
| Randi Wardum | Kyndil | 94 | (16) |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 90 | (9) |
| Marjun Tróndarson | Neistin | 83 | (16) |
| Katarina Stepanov | Stjørnan | 78 | (10) |
| Sunfríð B. Jacobsen | StÍF | 78 | (32) |
| Poula D. Olsen | StÍF | 75 | |
| Rannvá Augustinussen | VB | 74 | (1) |
| Heidi Maria Akselsen | Søljan | 74 | (8) |
| Ása Dam á Neystabø | Neistin | 71 | (2) |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Halgir D. Olesen | H71 | 115 | (13) |
| Damir Oros | Neistin | 111 | (19) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 104 | (9) |
| Ingi Olsen | VÍF | 99 | (26) |
| Leivur Justinussen | StÍF | 95 | (20) |
| Agnar Joensen | VÍF | 88 | (6) |
| Høgni Klein | Kyndil | 88 | (10) |
| Áki Mørk | Neistin | 86 | (7) |
| Regin Petersen | KÍF | 84 | (9) |
| Piti Negru | H71 | 81 | (5) |
| Josef Abrahamsen | Kyndil | 72 | (13) |
| Henrik Gerster | H71 | 69 | (6) |
| Blagoje Buha | Neistin | 68 | (12) |
| Alexandur Johansen | StÍF | 68 | (21) |
| Jakob Jónsson | Kyndil | 65 | (2) |